Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Gulu læknahúsini

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir eru við læknahúsunum (gulu húsunum), sum hoyra til Klaksvíkar Sjúkrahús?
2. Hvussu nógvur peningur er settur av á fíggjarlógini til gulu húsini?

Viðmerkingar:
Gomlu læknahúsini norðan fyri Klaksvíkar Sjúkrahús eru í ringum standi. Nógv hevur verið tosað um, hvat húsini skulu brúkast til, men kortini er onki hent í málinum. Fyri at fáa greiðu á hvat fer at henda við sokallaðu gulu húsunum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 15. juni 2021

Beinta Løwe Jacobsen